

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 11 - 2012

# Skilagott at steðga nú og bora aftur í 2013

Boringin av leitibrunni 6104/21-2 fyribils steðgað og verður tikin upp aftur í 2013, sigur Jarðffeingi í tiðindaskrivi. Jarðfeingi hevur játtað umsókn frá Statoil um fyribils at gevast við at bora brunnin 6104/21-2, eisini nevndur Brugdan ll, og at taka arbeiðið upp aftur komandi ár. Avgerðin er grundað á, at hetta tøkniliga og jarðfrøðiliga er ein avbjóðandi verkætlan, og fremsta mál er at fáa best møguligt úrslit burturúr. Boringin av brunninum byrjaði 17. juni í ár, og væntaði fyristøðufelagið, at arbeiðið fór at taka 4-5 mánaðir. Tá arbeiðið nú vísir seg at taka longri tíð, og veturin stendur fyri durinum kann væntast, at vánaligt veður fer at darva arbeiðinum. Tí verður tað mett skilabetri at steðga á og taka arbeiðið upp aftur komandi ár. Nú verður riggað av, og væntandi fer pallurin Cosl Pioneer av økinum miðskeiðis í vikuni. Loyvi 006 varð latið í fyrsta útbjóðingarumfari í 2000. Hetta er annar brunnurin, ið verður boraður í hesum loyvisøkinum. Fyrri brunnurin 6104/21-1, varð boraður í 2006. Fyristøðufelag í loyvi 006 er Statoil. Hinir loyvishavararnir eru ExxonMobil og Atlantic Petroleum. Mynd - Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, sum heldur tað vera best at steðga boring nú og byrja aftur næsta ár